# Uni avloysir Rasmus í Makrel

**Rasmus Rasmussen verður ikki við Makrel, tá bólkurin hetta vikuskiftið luttekur á Nordatlantisk Musikferstival í Keypmannahavn, í hansara stað kemur Uni R. Debess.**

TÓNLEIKUR

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Rasmus Rasmussen var eftir álopið herfyri og drápshóttanirnar, ið komu eftir hetta, innlagdur á psykiatrisku deild og fær tí ikki spælt á stóru konsertini hjá Makrel á Útnorður Tónleikafestivalinum í Keypmannahavn.

Rasmus Rasmussen var á AME tiltakinum í Norðurlandahúsinum í fyrra árið valdur til Føroya besta gittarleikara, og hansara leiklutur í Makrel er sera stórur. Sum sangskrivari og sum alt-umfevnandi partur av ljóðmyndini er ótrúliga ringt at ímynda sær Makrel uttan Rasmus. Men hetta vikuskiftið verður hetta altso veruleiki, tá Crawling Blue oddamaðurin Uni R. Debess skal royna at fylla holið eftir Rasmus í Makrel.

Rólant av Reyni, ið saman við Rasmusi røkir gittarleiklutirnar í Makrel, sigur við Sosialin, at Rasmus gav teimum boðini fyri tveimum vikum síðan, og síðan tá hevur bólkurin vant við Una R. Debess. Venjingin gongur sambært Rólanti stak væl.

- Vit hava givið Una fríar hendur, tað einasta sum hann skal spæla av Rasmusa gittarum eru melodilinjurnar, sigur Rólant. Teir í Makrel eru greiðir yvir, at Rasmus er ein so mikið egin og serligur gittarleikari, at tað var burtur úr vón og viti at biðja onkran annan spæla líka sum hann. Tí verður útgávan av Makrel, ið spælir leygarkvøldið í Hal D, beint aftan fyri Norður Bryggjuna í Keypmannahavn heldur øðrvísi, enn vit eru von við, og útsetingarnar av løgunum vera heilt serligar.

Makrel fer at spæla tónleik av teimum báðum fløgunum Wonderland og Transcend, men eisini eitt nýtt lag verður á skránni.

- Hetta er eitt nýtt Makrel lag, ið Rasmus hevur skrivað, sigur Rólant.

Fyri tíðina eru limirnir í Makrel búsitandi í ymiskum londum, og hetta ávirkar venjingina nakað nógv, men í sambandi við hesa framførsluna hevur bólkurin verið samlaður í Føroyum í 14 dagar, har teir hava vant saman.

Teir gleða seg nógv til framførsluna í Keypmannahavn. Teir hava spælt í danska høvuðsstaðnum nakrar ferðir, og Rólant sigur, at hetta dámar teimum altíð væl.



*Rasmus Rasmussen verður avloystur av Una R. Debess í leiklutinum sum gittarleikari og altdominerandi partur av ljóðmyndini hjá Makrel*
*mynd: nud*

## Útnorður tónleikafestivalurin

Norður Bryggjan í Keypmannahavn skipar fyri Útnorður Tónleikafestivalinum í grannahúsunum hjá Bryggjuni, Hal D, nú leygardagin 28. oktober

Fimm bólkar fara á pall á festivalinum. Tveir av bólkunum eru føroyskir, ein er íslendskur, ein er grønlendskur og ein er danskur.

Danski bólkurin er Who Made Who, hetta er eitt av nøvnunum, sum í vikuskiftinum framførdi á Iceland Airwaves í Reykjavík. Bólkurin hevur seinasta árið fingið alt størri fjepparaskara í Danmark og er uttan iva við, fyri at tryggja, at eisini danskir áskoðarar koma á konsert. Tónleikurin er eitt slag av blandipoppi, ið hevur tekur støðið í nógum ymiskum tónleikastílum. Føroysku bólkarnir verða 200 og Makrel, sum teljast millum fremstu føroysku rokkbólkarnir og hava báðir givið fløgu út í ár. Chilly Friday úr Grønlandi er sambært fyrireikarunum, tað størsta grønlendska rokkorkestrið, og sigst at vera væl svingandi og funky.

Festivalurin er leygarkvøldið frá kl. 20.30-2.30. Atgongumerki fáa á *www.politikenbillet.dk/nordatlanten*

**nud**

Hagstova Føroya er sjálvstøðugi hagtalsstovnur landsins. Stovnurin er í trimum deildum - Hagtalsdeild, KT-deild og Útgávudeild, sum samstarva um at veita almenninginum góð og skjót hagtøl um so nógv viðurskifti sum til ber. Á stovninum arbeiða 15 fólk - búskaparfrøðingar, samfelagsfrøðingar, KT-tøkningar og skrivstovufólk.

STARV

BÚSKAPARFRØÐINGUR

HAGSTOVAN SÓKNAST EFTIR EINUM BÚSKAPARFRØÐINGI TIL AT STANDA FYRI HAGTØLUNUM UM GJALDSJAVNA OG UTTANLANDSSKULD.

Ábyrgd

Uppgávan er at stíla fyri innsavningini og viðgerðini av upplýsingum til hagtøl um gjaldsjavna og uttanlandsskuld, at fremja uppgerðina sambært altjóða forskriftum og at kunngera úrslitini alment.
Tú situr ikki einsamallur ella einsamøll við uppgávuni, tí búskaparfrøðingarnir á Hagstovuni eru saman í toymi, sum arbeiðir tætt saman í felags arbeiðsætlan, har hvør einstakur kortini hevur sínar ábyrgdir.

Førleikar

Vit sóknast tí eftir einum væl útbúnum búskaparfrøðingi, við áhuga fyri tjóðarbúskapi og hagtølum sum heild.
Góðir førleikar til hagtalsliga viðgerð av innheintaðum upplýsingum eru neyðugir og kunnleiki til vinnuligu viðurskiftini í landinum er ein fyrimunur.
Góð samstarvsevni og positivan hugburð til uppgávuna leggja vit stóran dent á.

Starvið

Starvið er fulltrúastarv á Hagstovuni og verður samsýnt við løn sambært galdandi sáttmála millum Búskapar- og Løgfrøðingafelagið og Fíggjarmálaráðið.
Umsóknarfreistin er 1. novembur 2006, tá skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi. Vilt tú vita meira um starv, treytir og arbeiðspláss, ring so til Hermann Oskarsson ella John Jacobsen á telefon 35 28 00.

TEAM85

HAGSTOVA FØROYA
GLYVURSVEGUR 1 · POSTRÚM 2068 · FO-165 ARGIR
TLF. +298 35 28 00 · FAX +298 35 28 01 · HAGSTOVA@HAGSTOVA.FO · WWW.HAGSTOVA.FO